# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Ótrygga framferðin hjá Naser Khader og óvissan um politikkin ræddu fólk burtur frá Ny Alliance*

*(Kasper Hansen, lektari)*



*MS Explorer var bygt í Finnlandi í 1969. Skipið var skrásett í Liberia, men eitt felag í Kanada átti og rak tað*

# Ein dag hendir tann stóra vanlukkan

**Øll tey 154 vórðu bjargað, tá ferðamannaskipið Explorer sigldi á eitt ísfjall við Antarktis. Men tey vóru heppin, og soleiðis verður tað ikki hvørja ferð, ávarar ein norskur serfrøðingur**

- Tað er bara ein spurningur um tíð, til vit fáa ta heilt stóru vanlukkuna, sigur Knut Espen Solberg. Hann er skipsverkfrøðingur og hevur ferðast nógv í teimum arktisku økjunum.

Seinasta fríggjamorgun sigldi ferðamannaskipið MS Explorer á eitt ísfjall við King George Island í Suðuríshavinum. Fýra tímar seinni tók norska skipið Nord-Norge ferðafólk og manning upp.

- Tey vóru vát og køld, men høvdu tað annars gott, segði Arnvid Hansen, skipari á Nord-Norge. Men tey vóru heppin, sigur Knut Espen Solberg.

- Vit, sum arbeiða í Arktis og Antarktis, eru av teirri uppfatan, at tað er sera vandamikið at sigla við ferðafólki á hesum leiðunum, og avleiðingarnar verða óhugnaligar tann dagin, okkurt hendir, sigur Solberg. Hann heldur ikki, at ferðafólkini gera sær far um, hvussu vandafult tað er at sigla í íshavinum.

- Bjargingartænasturnar í hesum økjunum eru ikki fyrireikaðar til stórar vanlukkur. Eitt nú er ikki nóg mikið av tyrlum til at flyta fleiri hundrað fólk. Eitt annað er, at sjókortini yvir hesar leiðirnar eru vánalig, og skipini hava ikki skyldu til at hava loðs umborð, sigur Knut Espen Solberg við NTB.

# Russland vorðið politistatur

**Tann loyniliga løgreglan í Russlandi hevur størri vald mú, enn hon hevði í sovjettíðini**

Sunnudagin verður tjóðartingsval í Russlandi, og alt bendir á, at Vladimir Putin, forseti, og hansara sameindu fara at vinna greiðan sigur. Men teir fáa eisini góða hjálp.

Andstøðingar í Russlandi og vesturlendskir eygleiðarar siga, at tað eru fregnartænastumenn, sum stýra Russlandi í dag, og at hetta eru menn, sum fingu sína útbúgving hjá KGB í gamla Sovjetsamveldinum. Tríggir fjórðingar av teimum ovastu embætismonnunum í Kreml hava tilknýti til trygdartænastuna FSB, sum kom ístaðin fyri KGB, ella onkta av teimum loyniligu hernaðartænastunum.

Bretska blaðið The Economist skrivar, at FSB hevur tað veruliga valdið í dagsins Russlandi. Sergej Kovaljov, sum var ein av stuðlunum hjá Andrej Sakharov, sigur við blaðið, at FSB brúkar ikki somu framferð sum KGB, men at tænastan kortini ger seg inn á grundleggjandi rættindi.

- Í ein ávísan mun kunnu vit siga, at støðan er verri nú enn í sovjettíðini,. Øll, sum taka avgerðir, hava somu hugsjónir og somu uppfatan av, hvussu staturin skal skipast, sigur Kovaljov við Reuters.



*Russiska løgreglan hevur tikið fleiri politiskar andstøðingar teir seinastu dagarnar. Á myndini er tað mannarættindatalsmaðurin Lev Ponomarev, sum verður tikin*

Í dag verður Sergej Kovaljov roknaður sum ein av teimum seinastu stríðsmonnunum fyri mannarættindum í Russlandi. Í 1974 varð hann dømdur sjey ára fongsul. Hann ásannar, at russar hava størri talifrælsi í dag enn í sovjettíðini, men at talifrælsið er undir strongum eftirliti.

## STUTT SAGT

### Aftur skógareldar

Nú er aftur eldur í stórum skógarøkjum har suðuri í Kalifornia, og nógvastaðni hava myndugleikarnir givið fólki boð um at fara heiman. Í býnum Malibu, sum er kendur sum heimbýur hjá fólki av tí betra slagnum, stríðast umleið 1.700 sløkkiliðsmenn við við at fáa tamarhald á skógareldinum. Men tað er lættari sagt enn gjørt, tí vindur við hvirlum upp í 90 kilometrar um tíman ger arbeiðið hjá sløkkiliðsmonnunum sera trupult. Løgreglan segði í gjárkvøldið, at minst 49 hús vóru farin upp í royk, men at einki fólk hevði fingið skaða. Fyri umleið einum mánaði sínari doyðu meiri enn 20 fólk í stórum skógareldum í Kalifornia, og umleið 1.500 hús vórðu oyðiløgd.

### Veðrið elvir til vanlukkur

Náttúruvanlukkur, sum standast av broytingunum í veðurlagnum kring heimin, eru ferfaldaðar í tali tey seinastu tjúgu árini, og altjóða samfelagið noyðist taka taka stig til at tálma hesi gongdini. Tað stendur í einari nýggjari frágreiðing, sum altjóða hjálparfelagsskapurin Oxfam almannakunngjørdi um vikuskiftið. Felagsskapurin sigur, at tað er tann veksandi hitin á Jørðini, sum er orsøkin til altsamt fleiri vanlukkur. Sagt verður, at nú eru á hvørjum ári umleið 500 vanlukkur, ið kunnu knýtast at veðurlagnum, men at í 1980 vóru bara umleið 120 slíkar vanlukkur. Í hesum sama tíðarskeiði eru vatnflóðirnar seksfaldaðar í tali, sigur Oxfam.

### Leitaðu eftir vísindamanni

Fríggjakvøldið fóru menn úr fleiri íslendskum bjargingarfeløgum at leita eftir einum fronskum vísindamenni, sum ikki var komin aftur til ásetta tíð. Maðurin var farin at taka nakrar GPS-sendarar millum Kálfafelli og Þórisvatn niður og skuldi koma aftur fríggjadagin. Tá hann ikki kom fram, varð farið at leitað, um tíðliga um náttina varð maðurin funnin. Tað vísti seg, at bilur hansara hevði hvørki olju ella streym.